

*Øssur Johannesen spælir sjálvur øll ljóðførini á nýggju fløguni*

# Daprir tónar frá Øssuri Johannesen

**Daprar persónligar lívsroyndir hava givið í blástur til nýggju tvífløguna »Lívsins tunga vetrarmyrkur« hjá Øssurin Johannesen**

TÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Dapra huglagið rennur sum eitt tema gjøgnum improviseraðu kompositiónirnar hjá Øssuri Johannesen á nýggju fløguni »Lívsins tunga vetrarmyrkur«, har hann sjálvur spælir øll ljóðførini

Tann skapandi tilgongdin tey tvey kvøldini, tónleikurin varð tikin upp, var heilt nátúrlig. Tí er heldur onki tilgjørt, leitað ella pátikið yvir tónleikinum, sigur Øssur Johannesen.

- Tónleikurin streymaði heilt nátúrliga gjøgnum meg og varð tikin upp í hesum líki. Hendan tvífløgan er eitt nátúrligt framhald av mær, av míni tónlistarligu ferð gjøgnum lívið og tí, eg havi skapt frammanundan. Hon inniheldur mína sál og anda og mínar persónligu lívsupplivingar, sigur Øssur Johannesen.

Rasmus Rasmussen hevur lagt ljóðlandsløg og trummuforrit afturat tónleikinum, eins og hann eisini hevur tikið upp og ljóðblandað fløguna.

Í fløguhúsanum eru litmyndir av málningum eftir Øssur Johannesen.

Tað er plátufelagið Tutl, sum gevur tvífløguna »Lívsins tunga vetrarmyrkur« út.




# Harmonikutónar í Norðurlandahúsinum

**Í morgin verður høvi at hoyra harmonikutónar í Norðurlandahúsinum tá norska harmonikuliðið Lista Trekkspillklubb fer á pall í Klingruni**

TÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Norska Lista Trekkspillklubb er ikki eitt heilt vanligt harmonikulið, men líkist meir einum liði av spælimonnum, tí ljóðførini eru so nógv og ymisk. Harmonikur, "2-rader", gittar, bass, fiólir og vaskibrett kann nevnast.

Bólkurin byrjaði at spæla í 1996. Teir koma saman hvørja viku at venja og hava sum frálíður fingið eina breiða lagaskrá. Teir eru nógv umbidnir at spæla á suðurlandinum í Noregi og hava eisini verið uttanlanda, m.a. í Skotlandi, Svøríki og Danmark og spælt.

Teir vóru við til at stovna Nordsjøfestivalen í 1999, sum hevur verið í Farsund á hvørjum ári síðan. Sum tað sæst á heimasíðuni hjá Nordsjøfestivalinum: www.nordsjofestivalen.no, er hetta voksið til eitt stórt tiltak, har tónleikarar úr nógvum londum koma saman. Millum annað vóru Spælimenninir úr Føroyum við í 2004.

Teir hava givið út 2 fløgur: Listavalsen í 2002 og Listaleiken í 2007.

14 av teimum 25 spælararnum í Lista Trekkspillklubb er við á Føroyaferðini

*Lista Trekkspillklubb verða at hoyra í Klingruni í Norðurlandahúsinum í morgin klokkan 16*



ÚTBJÓÐING

## Dagføring av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, 5. byggistig

Við hesum verður arbeiðið at dagføra mikrobiologi v.m. á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðini verða boðin út í niðanfyri nevndu arbeiðstøkum:

1. Stórarbeiðstøka
   a) Jørðarbeiði
   b) Betongarbeiði
   c) Stálarbeiði
   d) Timburarbeiði
   e) Snikkaraarbeiði
   f) Gólvarbeiði
   g) Málaraarbeiði
   h) Múraraarbeiði
2. HVS-arbeiðstøka
3. El-arbeiðstøka

Møguleiki er eisini fyri at bjóða uppá arbeiðið í høvuðsarbeiðstøku.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- Gera tilbygning til mikrobiologi
- Gera dagføringar av rúmum, ið verða nýtt til mikrobiologi v.m.

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðinum 1. juli – 1. desember 2009

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-110 Tórshavn

Mánadagin 25. mai 2009, kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá mánadegi 04. mai 2009, við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 5.000, ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Eik.
Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina, t.e. 1. juni 2009.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*